

# 500 BØRN LIVA Í FÁTÆKADØMI Í FØROYUM

**VÆLFERÐ** Nógv børn í Føroyum líða neyð vegna fátækadømi. Hetta kann hava stórar avleiðingar fyri børnini, bæði sálarliga, kropsliga og sosialt. Hetta siga tær báðar, Siri Hansen og Annika Antoniussen, sum hava kannað livikorini hjá støkum uppihaldarum

Rigmor Dam

Hon hevur ikki ráð til at keypa børnunum mjólk hvønn dag. Í staðin keypir hon eitt blikk av kálktablettum fyri 100 krónur. So fáa tey um ikki annað kálkina.

Ein onnur hevur ikki ráð til kjøt, og fær tískil allan døgurðamat frá privata hjálparfelagsskapinum "Hjálpin", sum koyrir útgingnan mat frá handlunum út til stakar uppihaldarar. Hóast kjøtið ofta er brúnt og ikki reytt, er tað frægari enn onki kjøt, tí børnini standa í vøkstri.

Ella hvat vit mammuni, sum fer oman á bakka við tráðu í hond eftir smáfiski, tí køliskápið er skralltómt.

Støku uppihaldararnir siga við ein munn, at tað er ikki yvirskot til annað, enn tað hægst neyðuga. So brillur, tannlækni, kavadraktir, gagg-ur, vetrarstivlar, føðingardagar, ferðir, konfirmatiónir ella boyli til tennirnar á barninum koma altíð í síðstu røð. Tí peningur er ikki til slíkt.

Alt hetta í lítla loynikrókinum í Norðuratlantshavi: Paradísinum Føroyum!

## Stættamunurin økist

Mikukvøldið var stórt tiltak í Miðlahúsinum, har nýggj kanning um korini hjá støkum uppihaldarum í Føroyum varð avdúkað.

Eitt fullsett hús, harímillum eisini fýra politikarar, lýddi á skakandi føroyska veruleikan, tá tær báðar Siri Hansen og Annika Antoniussen, sum báðar hava lisið Cand. Ped. Soc á Danmarks Pedagogiske Universitet, greiddu frá úrslitunum av kanningini.

Sambært teimum er hugburðurin í Føroyum sum heild, at her er onki fátækadømi, og at familjan altíð traðkar til, tá ringast veit við.

- Men, tá samfelagið á hendan hátt skákar sær undan vælferðarábyrgdini og leggur hana yvir á familjurnar, er vandi fyri, at munurin millum fátøk og rík bara økist, sigur Annika Antoniussen, sum í hesum sambandi vísir á, at polariseringin, ella stættamunurin, uppstendur, tá tað er upp til familjurnar einsamallar at taka um endan.

- Tí øll hava bara ikki hasa familjuna við yvirskoti til at hjálpa vaksnum børnum og barnabørnum, sigur hon.

**» – Materiella undirskotið kann hava avleiðingar fyri menningina og sosiala lívið hjá barninum**

## Hava tvey og trý størv

Alt hetta, í smáum føroyskum barnafamiljum við bert einum forsyrgjara.

Familjum, ið sum oftast búgva bíliga til leigu hjá privatum útleigarum, og sum hvørja løtu kunnu verða settar á gøtuna.

Og ikki í alkaholiseraðum, sjúkum ella á annan hátt veikum familjum, men hjá hartarbeiðandi og útbúnum vaksnum forsyrgjanum, sum ofta hava bæði tvey og trý størv fyri at fáa ráð til mat.

Tað eru í øllum førum 1.000 stakir uppihaldarar í Føroyum, og roknað verður við, at tað í minsta lagi eru 500 børn, sum liva í fátækadømi.

Í kanningini hava Siri Hansen og Annika Antoniussen tosað við 22 stakar uppihaldarar kring